# Nú er klárt at selja bláu lastbilarnar

**Í dag skuldi starvsfólkið fáa boð um, at størvini hjá teimum verða ikki til leingi afturat, tí nú verða Farmeleiðir hjá Strandferðsluni seldar**

EINSKILJING

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Nú hava øll starvsfólkini á Farmeleiðum hjá Strandferðsluni fingið boð um, at størv teirra verða ikki til longi afturat.

Orsøkin er, at nú hevur landsstýrið tikið endaliga avgerð um einskilja Farmaleiðir.

Í løtuni verður síðsta hond løgd á ætlanina at einskilja Farmaleiðir. Sostatt verða tær lýstar til sølu í allar nærmastu framtíð og longu 1. apríl, skal sølan verða avgreidd.

Landsstýrið og Strandferðslan leggja dent á, at broytingarnar verða framdar við virðing fyri starvsfólkunum og í hesum sambandi fáa øll starvsfólkini á Farmaleiðum takk fyri tað sera góða avrik, tey hava skapað øll hesi seinastu árini, hóast umstøðurnar mangan hava verið truplar og ótryggar, siga Strandferðslan og Innlendismálaráðið í tíðindaskrivi í dag.

Av tí at tað snýr seg um munandi broytingar í starvsviðurskiftunum, hava starvsfólkini ikki skyldu til at halda fram hjá nýggja arbeiðsgevaranum.

Starvsfólkini hava tó fingið tilboð um at fylgja við í søluni yvir til tann, sum yvirtekur Farmaleiðir.




*Longu 1. apríl skal einskiljingin av Farmaleiðum verða avgreidd, men Strandferðslan skal varðveita ein avmarkaðan flutning eftir í sambandi við útoyggjarnar, Sandoyar og Suðuroynna. Samstundis skal siglingin út í Mykinesar bjóðast út*

Tey starvsfólk, sum ikki ikki vilja halda fram hjá nýggja arbeiðsgevaranum fáa ætlanarskriv um uppsøgn eftir teimum reglum og sáttmálum, sum eru galdandi.

Men tey starvsfólkini, ið ynskja at halda áfram hjá nýggja arbeiðsgevaranum, varðveita sína uppsagnartíð hjá nýggja arbeiðsgevaranum.

Tilsamans arbeiða 31 fólk hjá Farmaleiðum.

Øll verða tó ikki søgd um, tí nakað av fólki verður eftir. Her er talan um tey, sum avgreiða skip og tey, sum arbeiða í pakkhúsum og einstøk afturat. Mett verður, at eini 10 fólk skulu verða eftir hjá Strandferðsluni.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, ásannar kortini, at tað er tó ongin trygd fyri, at tey sleppa at varðveita størvini, tí nýggi eigarin hevur sjálvandi fríar ræsir at leggja til rættis og skipa fyri, soleiðis sum hann vil og at hava tey fólk í starvi, sum hann heldur tæna endamálinum best.

Samstundis, sum Farmaleiðir verða einskildar, verður eisini arbeitt við at bjóða út siglingina út í Mykines, út til privat at reka og tað skal verða longu frá 1. mai. Men tann, sum fær ta rutuna at røkja, skal eisin binda seg til at avgreiða farmaflutningin ímillum Sørvág og Mykines.

### Gevst við øllum flutningi

Einskiljingin ber í sær, at Strandferðslan nú gevst við øllum farmaflutningi á landi.

Tó verður ein avmarkaður flutningur eftir á einstøkum økjum. Eitt nú skal Strandferðslan varðveita ein ávísan fiskaflutning ímillum pakkhúsið í Havn og pakkhúsið á Tvøroyri. Harafturat skal Strandferðslan varðveita flutningin av stykkjagóðsi ímillum Klaksvík og bygdirnar í Kalsoy, Svínoy og Fugloy og harafturat skal flutningurin av stykkjagóðsi ímillum pakkhúsið í Havn og Hestoy, umfram ímillum bygdirnar í Sandoy og Skúvoynna, varveitast hjá Strandferðsluni.

Strandferðslan fer eisini lutvíst at taka sær av fiskaflutningi úr meginøkinum og í Sandoynna.

Í dag eru Farmaleiðir skipaðar soleiðis, at skipaavgreiðsla, pakkhús og akfør hanga saman í einum samlaðum kervi.

Við søluni skulu Farmaleiðir skiljast sundur, soleiðis at nakrar uppgávur, eitt nú pakkhúsini í Suðuroy, Tórshavn og í Klaksvík, verða verandi eftir í Strandferðsluni. Eisini skal útbúnaður til skipaavgreiðslu framvegis verða eftir á Strandferðsluna.

– Hetta er neyðugt fyri at virksemið hjá Strandferðsluni við at flyta farm sjóvegis kann halda fram,tí Strandferðslan hevur flutningsskyldu á sjónum, sigur Jacob Vestergaard.

Í sambandi við at nýggi Smyril kom, keypti Strandferðslan átta kølig frystilastir og tær verða allar verandi eftir í Strandferðsluni, so at hon kann røkja sjóvegis flutningsskylduna til Suðuroyar.

Somuleiðis verður ein forvognur eftir í Suðuroy.

Annars er ikki ætlanin, at koyra fisk runt til fiskavirkini í Suðuroy, tí har eru veitarar, sum kunnu taka sær av tí. Tó ber til í undantaksføri at koyra runt í Suðuroy við fiski, tá ið smápartí til fleiri keyparar er í somu bingju, ella tá ið viðskiftafólkini ikki sjálvi kunnu heinta hann. Tí verða frystilastirnar varðveittar.

Jacob Vestergaard sigur, at í ár verður annars farið undir at byggja nýtt pakkhús á nýggju samferðsluhavnini á Krambatanga og tá verður støða av nýggjum tikin til útkoyring av fiski í Suðuroy.

Strandferðslan skal eisini framyvir skipa fyri landvegis flutningi av stykkjagóðsi og avmarkaðum fiskaflutningi millum pakkhúsið í Havn og bygdirnar á Sandoynni og Skúvoyar hvønn gerandisdag í viku.

Ein bilur verður eftir í Sandoy til at røkja hesa uppgávu.

Standferðslan skipar eisini soleiðis fyri, at at farmur kann latast inn og heintast í einum avgreiðsluhøli í Klaksvík. Farmurin verður koyrdur millum hetta avgreiðsluhølið og allar bygdir í Kalsoy og Hvannasund einar 2 ferðir um vikuna.

Annars fer Strandferðslan framvegis at avgreiða farm, sum skal flytast sjóvegis, tí tað hevur hon skyldu til.

Men allur annar flutningur eftir landi, heldur uppat, uttan tann avmarkaði flutningurin í Suðuroy, Sandoy og Norðoyggjum og øðrum útoyggjum.

Men flutningurin fevnir heldur ikki um vøru, sum kann flytast við við Postverkinum ella sum vinnuligur flutningur.

Somuleiðis verður allur serflutningur hereftir einans røktur av privatum flutningsfeløgum.

# Umstríddur fundur í SEV verður 17. februar

**Nú er endiliga greitt nær umboðsnevndin hjá SEV skal koma saman at viðgera trupulleikan í SEV**

SEV

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Tað verður tann 17. februar, at tað kanska fæst ein endi á stríðnum, sum hevur plágað í SEV seinastu tíðina.

Tá verður nevniliga tann nógv umrøddi fundurin í umboðsnevndini í SEV, har trupulleikin í SEV skal umrøðast.

Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsnevndini í SEV, hevur kallað umboðsnevndini til fundar á Hotel Føroyum fríggjamorgunin tann 17. februar klokkan 11.

Tað er minnilutin í stýrinum fyri SEV, sum hevur biðið um fundin og minnilutin hevur javnan sóknast eftir, at formaðurin í umboðsnevndini fór at taka áheitanina til eftirtektar.

Og nú hevur Hans Tausen Olsen tikið støðu til, nær fundurin skal verða og innkallingin til fundin verður send limunum í umboðsnevndini í morgin, sigur

Ein spurningur, sum hevur verið frammi í hesum sambandi, er um økisfundir skuldi vera kring landið fyri at kunna limirnar í umboðsnevndini so at teir kundu vera so væl ílætnir, sum gjørligt t il at umrøða málið á fundinum

Men Hans Tausen Olsen sigur, at tað fer hann ikki at gera.

Kortini sigur hann, at verður heitt á hann um at koma á fund, við umboðsnevndarlimir kring landið, fer hann.

### Stórmál á skránni

Tað skerst ikki burtur, at tað eru stórmál á skránni. Kortini er spurningurin, hvørji mál, umboðsnevndin fer at viðgera.

Tá ið minnilutin bað um fund í umboðsnevndini, var ætlanin, at fáa nevndina at umrøða leiðsluviðurskiftini í SEV.

Stjórin, Klæmint Weihe, hevur fingið ætlanarskriv um uppsøgn, men minnilutin metir ikki, at grundarlag er fyri at siga hann upp.

Harafturat koyrdi stýrið fyri SEV, Leiv Hansen frá sum formann herfyri og valdi Kim Durhuus ístaðin.

Minnilutin í stýrinum vil eisini hava umboðsnevndina at taka støðu til, um nýtt stýrið skal veljast og í so fall, at velja nýtt stýri

Men formaðurin í umboðsnevndini hevur áður sagt, at leiðsluspurningurin í SEV, er eitt mál, sum umboðsnevndin ikki kann viðgera, tí hon hevur onki við hetta at gera.

Spurningurin um leiðsluna í SEV, er ein spurningur, sum liggur hjá stýrinum burturav og tí hevur umboðsnevndin onki við hann at gera.

Hvussu stýrið er skipar seg er eisini eitt stýrismál burturav og tað hevur nevndin sostatt heldur onki við at gera.

Hinvegin kann umboðsnevndin altíð velja nýtt stýrið.

Eitt annað mál, sum minnilutin í stýrinum vil hava umboðsnevndina at viðgerða, er, um nýggjur formaður skal veljast í umboðsráðnum fyri Hans Tausen Olsen og tað kann umboðsnevndin viðgera.



*Leivur Hansen í SEV stýrinum, hm. og Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsnevndini, heilsast á fundi í stýrinum herfyri. tann 17. februar standa teir aftur yvirav hvørjum øðrum*